

# Starvsfólk til plan- og rakstrardeildina

Tórshavnar kommuna stendur fyri nógvum áhugaverdum byggi- og skipanaðarligum arbeiði. Tí søkja vit eftir nýggjum starvsfeløgum, ið hava hug og dirvi at seta eina røð av spennandi uppgávum í verk.

**Arbeiðsuppgávur**
eru m.a. at viðgerða fyrisitingarlig mál innan tekniska ábyrgdarøkið hjá kommununi. Talan er um uppgávur innan m.a ferðsluráðlegging og viðlíkahald av vegum og kloakkleiðingum.

**Førleikakrøv**
Tað er neyðugt at tú ert verkfrøðingur, byggifrøðingur ella hevur útbúgving á líknandi støði og hevur góðar arbeiðsroyndir, umframt royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðuga førleikan at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforrit, ið hoyra til Microstation, Microsoft Office og Navision. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Kommunan ynskir, at tú ert røkin, gongur undan, tá umrøður at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka avgerðir og duga væl at orða teg í skrift og talu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
Við at venda sær til Boða Haraldson, býarbyggifrøðing, ella Jákup Egholm Hansen, tekniska stjóra á telefon 30 20 10.

**Umsókn**
Saman við viðmælum, avriti av prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. oktober 2008. Merkið umsóknina »Starvsfólk á plan- og rakstrardeildini«.

**Plan- og rakstrardeildin**
Plan- og rakstrardeildin er, eins og heilsu- og umhvørvisdeildin og lendisdeildini, partur í nýggja bygnaðinum í teknisku deild, har býarverkfrøðingurin hevur leiðsluna.

Á plan og rakstrardeildini fara um 6 fólk at starvast. Deildin heldur til í Posthúsbygninginum saman við byggi- og býarskipanardeildini.

Arbeiðsøkið hjá plan- og rakstrardeildini er rættiliga fjølbroytt. Uppgávurnar eru av fyrisitingarligum slagi, tá umrøður byggimál og útstykkingarloyvi, at standa fyri planlegging, projektering og viðlíkahaldi av øllum kommunalum vegum og tekniskum veitingum.

**Tórshavnar kommuna**

---

ÚTBJÓÐING

# Verkætlan á Stóragerði

www.husasolan.fo





| | | | |
|---|---|---|---|
| Stødd: | 2 x 110 m² | Vaskirúm: | 1 |
| Bilpláss: | 2 | WC/bað: | 1 |
| Bilhús: | 1 (møguligt) | Køkur: | 1 |
| Hjallur: | 1 (møguligur) | Stovur: | 1 |
| Goymslurúm: | 1 (møguligt) | Longd: | 10,5 m |
| Kømur: | 3 | Breidd: | 9 m |

## Útbjóðingararbeiði á Stóragerði

Útbjóðingararbeiði verða við hesum boðin út. Øll áhugaði eru vælkomin at bjóða upp á eitt ella fleiri arbeiði.

- **El-arbeiði**
- **HVS-arbeiði**
- **Málara-arbeiði**
- **Múring**
- **Køk / bað**
- **Vindeygu / hurðar**
- **Gólv / flísar**

**Spf. Viking Smíð**, Tórsgøta 13, 100 Tórshavn, viking@viking.fo

***Áhugaðir bjóðarar kunnu ringja á tel. 565600***

VIKING SMÍÐ

KERN.fo